

## Skeið í matvørureinføri

Fiskivinnuskúlin í Vestmanna í samstarv við D&G Skeið

**Skipað verður fyri skeiði í "Matvørureinføri"**

- **Nær:** **Mánadag 11. juni til mikudag 13. juni, kl. 8.30-16.00**
- **Hvar:** **Í hølum hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag í Havn, Bøgøtu 10**

Málbólkur: Fólk, sum starvast við matvørum

Skeiðshaldarar: Drós í Ólavsstovu & Gudna á Rógvi Joensen

Skeiðskostnaður: Kr. 4.000 u/mvg, sum verður kravt inn undan skeiðinum
(matur og tilfar íroknað)

Endamál: Tryggja vitanina hjá starvsfólki um reinføri. Serliga ætlað fólki, sum starvast innan matvøruvirkir, soleiðis at eingin gerst sjúkur av mati, ein keypir ella fær bjóðaðan á matstovu, ellisheimi, sjúkrahúsi o.s.fr..

Innihald:
- Kunnleiki um matvørubornar sjúkur
- Kunnleiki um vøkstur av ymiskum smáverum í matvørum
- Kunnleiki um innaneftirlit, viðbreknar stýringsliðir og reinføri
- Kunnleiki um, hvussu matvørur skulu handfarast
- Kunnleiki um handfaring av eggum
- Skilja týdningin av persónligari reingerð og týdning av at nýta røtt reingerðingarevnir og hættir

Prógv: Skeiðið endar við prógvtøku

Freistin at boða frá luttøku er **6. juni 2007**. Tilmelding fer fram við at senda teldupost til: dg@dgskeid.net ella fax. +298 317055
**Tilmeldingin er bindandi.** Skeiðið er treytað av nóg stórari undirtøku.

| | |
|---|---|
| Eftirnavn: | Føðingardagur: |
| Fornavn: | Starv/ arbeiðspláss: |
| Gøta: | Tlf. arbeiði: |
| Postnr./ stað: | Tlf. heima: |
| Teldupostur: | Gjaldari: |

D&G FISKIVINNUSKÚLIN

---

**Heilsufrøðiliga Starvsstovan**

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. +298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD, VETERINARY AND ENVIROMENTAL AGENCY

# HJÁLPARFÓLK

## til marknaeftirlitsstøð í Kollafirði og Fuglafirði

Søkt verður eftir 2 tímaløntum hjálparfólkum í sambandi við arbeiði á marknaeftirlitsstøðunum fyri fiskaúrdráttir úr 3. londum, til setan skjótast gjørligt.

Starvið, sum er tilkalling, tá ið tørvur er á at fremja marknaeftirlit, fevnir um:

- Samleikaeftirlit
- Eftirlit av sjálvari vørusendingini, m.a. vørukanningar á marknaeftirlitsstøðini og at senda sýni til kanningarstovuna hjá okkum.

Heilsufrøðiliga starvsstovan syrgir fyri neyðugari upplæring.

Talan er um skiftandi arbeiðstíðir. Hetta skal skiljast soleiðis, at einki kann verða at gera í langa tíð og aðrar tíðir kann heilt nógv arbeiði verða á marknaeftirlitinum og tí sera langir arbeiðsdagar.

Neyðugt er við kunnleika til fisk og hagreiðing av fiskavørum.

Royndir við sýnistøku, góðskustýring og EDV á brúkarastøði eru fyrimunir.

Tú skalt hava koyrikort. Somuleiðis skalt tú hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt. Við setanini koma vit at leggja serligan dent á, at tú ert tøk-/tøkur tá tørvur er á at fremja marknaeftirlitið.

Starvið er tímalønt, sambært galdandi sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, sí heimasíðuna hjá lønardeildini, www.lnd.fo.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Elspu Petersen, embætisdjóralækna, ella Óluvu Niclasen, deildarleiðara.

Upplýsingar um Heilsufrøðiligu starvsstovu annars, síggjast á okkara heimasíðu, www.hfs.fo.

Umsóknir til starvið, við avriti av møguligum prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. juni 2007.

---

# Frá Vágs Bóltfelag

Eykaaðalfundur verður í VB-Húsinum sunnudagin tann 03. juni kl 17.00. Skrá sambart lógum felagsins.

Um ikki nóg nógvir limir møta á fundi til at skipa nevndinar verður felagi avtiki.

Vinarliga komi á fund og stuðli fjølment

VB-Hondbóltur

---

# Lærlingar

Vit søknast eftir lærlingum til rørsmíð at byrja sum skjótast.

**Hógv Handilsvirki**
Oman á Sand 15 · FO-660 Søldarfjørður
Tel 470 400 · Fax 470 401 · hogv@hogv.fo

---



## PICK UP TIL SØLU

Mitsubishi L200 árg. 09/01 koyrt 85.000 km.
Lastbilurin hevur sleipikrók.

**Tlf 211269**

---

W W W . S O S I A L U R I N . F O